# Sanna Hentze 50 ár



Góða vinkona mín Sanna Hentze fylti 17 juli 50 ár. Sanna er fødd á Skála og uppvaksin í Havn, dóttir Ingibjørg og Herluf Andreasen. Hon giftist Levi Hentze, Heiman av Sandi, í 1977 og fingu tey børnini Bjørg og Pætur.

Vit komu at kennast á Læraraskúlanum í 1992, har vit gingu í sama flokki, og gjørdust vit skjótt bestu vinkonur. Nógvar stuttligar og hugnaligar løtur hava vit havt saman, og ikki minst hava vit altíð havt nógv áhugavert at práta og kjakast um.

Serliga góðir hava teir nógvu longu gongutúrarnir verið. Sum balsam fyri sál og likam.

Eitt sum eyðkennir Sannu er, at hon altíð "er í sving", sum tikið verður til. Altíð er okkurt nýtt á skránni, og henni dámar sera væl nýggjar avbjóðingar. Ja, ikki er lætt at ímynda sær hana uttan eitt nýtt spennandi prosjekt fyri framman.

Ta tíð, eg havi kent hana, hevur hon tikið útbúgving sum lærari, zonuterapeutur og roykiavvenjari. Harafturat fór hon fyri fáum árum síðani bachelorútbúgving innan kost, rørslu og heilsu.

Fólkaheilsa, ítróttur og sunnur lívsstílur hevur altíð havt hennara stóra áhuga, og longu á ungum árum opnaði hon handil "Spíran", sum seldi økologiskar matvørur.

Á Læraraskúlanum hevði hon ítrótt sum linjufak, og tók hon eisini svimjilæraraprógv, tó at sigast skal, at tað, at skula kava frá 3 metur vippuni var beiskur biti at svølgja.

Sera kreativ og dugnalig er hon til handaligt arbeiði, og ikki óvæntað fekk hon eitt flott 11 tal í handarbeiði á Læraraskúlanum.

Eftir lokna læraraútbúgving fekk hon starv í Hoyvíkar skúla, har hon hevur arbeitt síðani.

At arbeiða við børnum og at undirvísa hevur hon serstakliga gott hegni til og at læra børnini góðar og sunnar kostvanar er eitt av hennara fremstu aðalmálum.

Sigast kann, at Sanna er áhugaverd kvinna við stórari drívmegi. Eisini kann sigast, at hon er fitt, hjálpsom og hjartagóð. Hon hevur stóra umsorgan fyri sínum kæru, sum hon altíð rættir eina hjálpandi hond, tá ið á stendur.

Góða Sanna, tú ert og hevur altíð verið ein sera góð og trúføst vinkona. Takk fyri alt tú ert fyri meg og hjartaliga tillukku á 50 ára degnum.

Vónandi fáa vit eitt gott veitslukvøld leygardagin 21. juli í Starvsmannafelagshúsinum.

Tær kærastu heilsanir

**Jónvá**

# Leiðaraskifti á Lágargarði



*Meta av Fløtum (v.m.) avloysir Marjun Smith í leiðarastarvinum á Lágargarði*

**Í sambandi við at Marjun Smith fer úr starvi sum leiðari á Lágargarði tann 1. august 2007 og Meta av Fløtum tekur við, verður móttøka á Lágargarði fríggjadagin 20. juli**

Leiðaraskifti verður á Lágargarði í Havn tann 1. august, tá Meta av Fløtum tekur við sum leiðari eftir Marjun Smith, sum hevur verið leiðari á stovninum, síðan hann læt upp í 1987. Í hesum sambandi verður móttøka á stovninum fríggjadagin 20. juli frá kl. 15-18.

Meta av Fløtum er 53 ára gomul og ættað úr Porkeri, men er búsitandi í Havn. Hon tók prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur í 1977 og hevur drúgvar royndir innan yrkið. Seinastu tíðina hevur hon røkt starvið sum leiðari fyri Heimatænastuni í Suðurstreymoyarøkinum.

Meta byrjaði á Lágargarði 1. juli, og hevur hon arbeitt saman við Marjun Smith fyrsta mánaðin í nýggja starvinum. Uppgávan hjá leiðaranum á Lágargarði fevnir um leiðslu og starvsfólkaviðurskifti, eins og hon hevur umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Á Lágargarði eru umleið 100 starvsfólk og 46 búpláss til eldri fólk og tvey umlættingarpláss, umframt at 36 eldri fólk gera brúk av tilboðnum á dagstovninum. Talan er um eitt tilboð til teirra, sum búgva heima, men sum koma á stovn um dagin.

Eisini hava tey tilboð til heimabúgvandi pensionistar um fysiurgiska venjing.

Á Lágargarði gera tey eisini mat til eldri fólk, sum ikki sjálvi orka at keypa inn og gera sær mat sjálvi. Matur verður koyrdur heim til yvir 100 fólk hvønn einasta dag.

**mg**

## Dagurin

**20. juli. Elias. Dagurin verður hildin til minnis um profetin Elias, sum Kongabøkurnar í Gamla testamenti siga frá. Í Føroyum hevur hann fingið navnið Líggjas. Bíbilskt navn, ið merkir *Jahve er Guð mín.***

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Napoleon Johansen,** Miðvágur, vanliga nevndur Pole, kemur í Miðvágs kirkju í kvøld kl. 19, har bønarhald verður. Jarðarferðin verður fríggjadagin 20. juli kl. 14. Tey, sum vilja minnast Napoleon, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Miðvági

Lítli **Jan Karl Vidtfeldt**, sonur Marin Elisabeth og Kristoffur Vidtfeldt, andaðist á Landssjúkrahúsinum 18. juli. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Johanna Olsen, Vestmanna,** andaðist á Sýninini í Miðvági týsdagin 17. juli 88 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin kl. 16. Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina peningagávu til heimið á Sýnini, konto í peningastovninum.

**Helgi Mørkøre,** vanliga nevndur Helgi hjá Ki, andaðist brádliga mikudagin 18. juli í Klaksvík, 64 ára gamal. Farið verður úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18 úr Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í kirkjuna. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 12. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Berint Berthelsen** kemur í Sjóvarkirkju hóskvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju fríggjdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Berint, kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konto í peningastovunum.

## Prógv

Tann 16. juli 2007 fekk Jóhan Syderbø, Hoyvík, MSc prógv í verkætlanarleiðslu frá The University of Greenwich, School of Architecture and Construction í London.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**William Holm Jacobsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri vøkur og troystarík orð í kapellinum og í Ebenezer. Takk til Dupultkvartettina fyri vakran sang. Takk til urguleikarar og gravarar. Takk fyri heilsanir, uppringingar, vitjanir, bakstur, blómur og kransar. Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Margith**
**Kristian, Lív, Poul og Julianna**